# Petur skal døma U21-landsdyst

Petur Reinert, sum nú er altjóða føroyska dómaraumboðið, fekk í farnu viku nýggja uppgávu frá UEFA. Hann skal tann 11. september døma landsdyst millum Letlan og San Marino. Dysturin er partur av undankappingini fyri U21-landslið, og verður hann spældur í Riga.



# Alex til Chelsea

Hóast tað eru trý ár síðani, at Chelsea keypti brasilska verjuspælaran Alex úr Santos, hevur hann enn ikki spælt fyri enska stórfelagið. Útlendingalóggávan krevur nevnliga, at ikki-ES borgarar skulu hava spælt ávíst tal av landsdystum, um teir skulu spæla fótbólt í Onglandi, og tí varð Alex í fyrsta umfari leigaður til PSV Eindhoven. Í Hollandi hevur hann ment seg til ein av avgjørdu profilunum í heiðursdeildini, og við 14 landsdystum á baki er hann nú eisini um at røkka kravinum, sum sett verður. Úr London ljóðar eisini, at teir nú hava fingið øll pappír í rættlag, og tí verður Alex væntandi partur av hópinum, sum í ár skal stríðast fyri at endurvinna meistaraheitið frá Manchester United.

# Fingu tennis-egg frá norð-monnum

**U17 landsliðið, sum luttekur í NM í Danmark, tapti mánadagin fyrsta dystin 6-0 ímóti Noregi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir góðu avrikini og fínu úrslitini í Aberdeen fyri stuttum hevur verið vónað og kanska eisini roknað eitt sindur við, at Føroyar fóru at standa seg væl í NM kappingini fyri U-17 landslið, sum í hesi vikuni er í Jyllandi.

Fyrsti dysturin varð spældur í gjár, og úrslitið boðaði ikki frá góðum. Noreg vann 6-0, eftir at norðmenn eftir fyrra umfarið høvdu verið á odda 2-0. Málini vórðu skorað í 23., 33., 63., 64., 67 og 74. minutti. Dysturin varð spældur á Hedensted stadion.

Føroyskaliðið: Thomas J. Thomsen, Monrad H. Jacobsen, Viljormur Davidsen, liðformaður, Sørmund Kalsø, Hanus Mortensen, Karl Løkin (Eli F. Nielsen, 68.), Jógvan Rói Davidsen (Bjarti Hansen, 71.), Jóan Símun Edmundsson (Jens Mikal Jensen, 75.), Róaldur Jacobsen, Mikal Jespersen, Hallur Hansson.

Føroyar skulu týsdagin spæla ímóti Danmark á Ikast stadion. Mánadagin spældi Danmark ímóti Belgia. Úrslitið var 1-1.

# 205 runnu á ólavsøku

Fríggjakvøldið varð skipað fyri ólavsøkurenning á Skálatrøð. Í alt tóku 205 luttakarar lut í kappingini, sum varð hildin í góðum veðurlíkindum. Eisini hóast okkurt ælið kom niður, meðan kappast varð.

Á hjáløgdu talvu síggjast tey fimm, sum endaðu fremst í hvørjum aldursbólki.

**Ólavsøkurenningin 2007 - úrslit**

| Nr | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Bygd | Tíð |
|---|---|---|---|---|---|
| **Dreingir 10** | | | | | |
| 1 | Dánjal Karbech | Hansen | 1997 | Tórshavn | 00:02:13 |
| 2 | Ari | Olsen | 1998 | Strendur | 00:02:14 |
| 3 | Jógvan | Jóhannusson | 1998 | Argir | 00:02:16 |
| 4 | Julian | Gregersen | 1998 | Treysti | 00:02:22 |
| 5 | Niklas.T | Kruse | 1999 | Norðskáli | 00:02:24 |
| **Dreingir 13** | | | | | |
| 1 | Jákup Sveinbjørn | Olsen | 1994 | Sørvágur | 00:04:19 |
| 2 | Sølvi | Egilsson | 1995 | Frælsi | 00:04:23 |
| 3 | Karl Marius | Dahl | 1994 | Oyrareingir | 00:04:34 |
| 4 | Símun | Johannesen | 1994 | Hoyvík | 00:04:39 |
| 5 | Tór av | Skarði | 1996 | Bragdið | 00:04:41 |
| **Dreingir 17** | | | | | |
| 1 | Hanus | Mortensen | 1991 | Tvøroyri | 00:03:46 |
| 2 | Daniel Djurhuus | Rein | 1990 | Bragdið | 00:04:07 |
| 3 | Rói | Agnarsson | 1991 | Tórshavn | 00:04:11 |
| 4 | Emil | Biskopstø | 1991 | Treysti | 00:04:36 |
| 5 | Andreu | Vinyoles | 1992 | - | 00:05:23 |
| **Dreingir 7** | | | | | |
| 1 | Ragnar | Samuelsen | 2000 | Tórshavn | 00:02:32 |
| 2 | Julian | Kragesteen | 2000 | Tórshavn | 00:02:42 |
| 3 | Ragnar | Rasmussen | 2000 | Tórshavn | 00:02:44 |
| 4 | Dávið | Hentze | 2000 | Tórshavn | 00:02:53 |
| 5 | Tróndur | Mikkelsen | 2000 | Tórshavn | 00:02:56 |
| **gentur 10** | | | | | |
| 1 | Olivia T. | Kruse | 1997 | Norðskáli | 00:02:27 |
| 2 | Margit W. | Fríðmundsdóttur | 1999 | Bragdið | 00:02:36 |
| 3 | Jonna Fríðriksdóttir | Bláhamar | 1997 | Tórshavn | 00:02:38 |
| 4 | Monika Pernille | Jacobsen | 1999 | Treysti | 00:02:41 |
| 5 | Súsanna | Hjallnafoss | 1998 | Tórshavn | 00:02:44 |
| **gentur 13** | | | | | |
| 1 | Kristín Lív Svabo | Jónsdóttir | 1995 | Frælsi | 00:04:34 |
| 2 | Annika Højgaard | Povlsen | 1995 | Runavík | 00:04:39 |
| 3 | Monika | Biskopstø | 1994 | Treysti | 00:04:54 |
| 4 | Bjørk Reynagarð | Svabo | 1996 | Frælsi | 00:05:08 |
| 5 | Margreta | Samuelsen | 1996 | Tórshavn | 00:05:13 |
| **gentur 17** | | | | | |
| 1 | Rebekka | Fuglø | 1993 | Treysti | 00:04:05 |
| 2 | Rannvá | Djurholm | 1992 | Bragdið | 00:04:12 |
| 3 | Helena Højgaard | Povlsen | 1992 | Runavík | 00:04:28 |
| 4 | Sofie Kirk | Henriksen | 1992 | - | 00:06:41 |
| **gentur 7** | | | | | |
| 1 | Petra | Ingebrigtsen | 2000 | Vestmanna | 00:02:48 |
| 2 | Lilja | Højgaard Povlsen | 2001 | Runavík | 00:02:52 |
| 3 | Urd Reginsdóttir á | Lofti | 2001 | Argir | 00:02:55 |
| 4 | Silja | Sámalsdóttir | 2000 | Hoyvík | 00:02:57 |
| 5 | Sólvá Rein | Magnadóttir | 2000 | Tórshavn | 00:03:01 |
| **Kvinnur** | | | | | |
| 1 | Bjørk Herup | Olsen | 1991 | Bragdið | 00:18:57 |
| 2 | Maja | Sølvsten | 1982 | Tvøroyri | 00:21:36 |
| 3 | Fríðunn | Steinberg | 1976 | Treysti | 00:22:45 |
| 4 | Frida | Poulsen | 1968 | Bragdið | 00:22:55 |
| 5 | Katrin Rubek | Nielsen | 1970 | Tórshavn | 00:23:22 |
| **Kvinnur - veteranar** | | | | | |
| 1 | Jóhanna | Køtlum | 1961 | Tórshavn | 00:26:38 |
| 2 | Birgitte | Sølvsten | 1954 | Tvøroyri | 00:28:14 |
| 3 | Nora | Busquets | 1960 | - | 00:28:24 |
| 4 | Petra | Søltoft | 1954 | - | 00:29:04 |
| 5 | Augusta | Mikkelsen | 1960 | Tórshavn | 00:32:44 |
| **Menn** | | | | | |
| 1 | Sam | Vang | 1970 | Bragdið | 00:16:35 |
| 2 | Jóan Karl | Joensen | 1987 | Bragdið | 00:17:18 |
| 3 | Signar | Røsvik | 1974 | Bragdið | 00:17:21 |
| 4 | Sigurð B. | Justinussen | 1967 | Bragdið | 00:17:23 |
| 5 | Helgi Winther | Olsen | 1980 | Tórshavn | 00:17:55 |
| **Menn - veteranar** | | | | | |
| 1 | Bent | Povlsen | 1961 | Runavík | 00:16:38 |
| 2 | Jósvein Herup | Olsen | 1958 | Bragdið | 00:18:40 |
| 3 | Hjalti | Gunnarstein | 1961 | Bragdið | 00:18:44 |
| 4 | Óli | Olsen | 1949 | Bragdið | 00:19:21 |
| 5 | Jógvan | Thomsen | 1960 | Bragdið | 00:20:29 |

# Rógvi venur í Onglandi

**Í annaðkvøld skal Rógvi Jacobsen eftir ætlan spæla við í ein hálvleik, tá Carlisle spælir venjingardyst móti Middlesbrough**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er enska felagið, sum hevur ynskt at fáa Rógva Jacobsen at koma yvir og hyggja at umstøðunum har, umframt at teir eisini vilja síggja hann í venjing í dysti.

- Talan er støðugt um fyrispurningar mótvegis fleiri av føroysku landsliðsspælarunum. Og nú mugu vit so síggja, hvussu ítøkiligt hetta er, sigur Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá Rógva.

Hann vil ikki enn siga, hvørt talan verður um nakrar samráðingar við Carlisle, sum spælir í triðbestu ensku deildini.